## Alment um viðbøtur fyri leiðarastørv eftir AKF sáttmálanum.

Viðurskifti, sum hava týdning, tá støða skal verða tikin til, hvussu eitt deildarleiðarastarv verður flokka, og hvør viðbót verður givin eru m.a.:

- Innihaldið og ábyrgdarstigið í starvinum
- Ábygdarøkið
- Vavið og slagið av arbeiðsleiðslu
- Hvussu líknandi størv eru flokka

Í metingini, út frá nevndu eyðkennum, verður í praksis ofta hugt eftir, hvussu nógvum starvsfólkum viðkomandi er leiðari fyri.

Deildarleiðarir flokkaðir sum deildarleiðari 1, hava vanliga 1-3 starvsfólk, meðan deildarleiðari 2 hava 4 til 10-12 starvsfólk. Tá leiðari verður flokkaður sum deildarleiðari 3, er talan um heilt stórar deildir, men tað eru einkult dømi um, at henda flokking er brúkt til størv, sum hava serliga tyngjandi ábyrgd og trýst í starvinum.

Í samráðingunum viðvíkjandi sáttmálan fyri tíðarskeiði 2015-2017 var viðbótin til deildarleiðara 1 broytt til eisini at umfata verkætlanarleiðara.

Ætlanin við hesari viðbót var, at leiðarar av stórum verkætlanum, sum í vavi kunnu samanberast við tað, at hava ábyrgd av einari deild (starvsfólk, fíggjarlig- og umsitingarlig ábyrgd), fáa somu viðbót, sum deildarleiðarar á fyrsta stigi. Talan skal vera um verkætlanir, sum krevja serligar førleikar innan verkætlanarleiðslu, og sum viðføra stóra ábyrgd m.a. fíggjarliga. Verkætlanin Glasir er í fundarfrásøgn okkara nevnt sum eitt dømi. Ætlanin við viðbótini var sostatt ikki, at hon verður latin til starvsfólk, sum natúrliga í sínum starvi, leypandi hava fleiri smærri verkætlanir.

Deildarleigara 1 viðbótin er í einstøkum førum eisini latin í samband við størv við ábyrgd fyri samansettum heildum, sum hava serliga tyngjandi fakliga ábyrd, uttan at talan er um beinleiðis starvsfólkaábyrgd, til dømis størv sum útbúgvingarleiðari á Fróðskaparsetrinum.